LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 8. mars 2024
J.Nr.: LUM-16- 23/18827-43
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

um viðgerðartíð og vantandi svar frá Tórshavnar kommunu viðvíkjandi klagu um garðbygging

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at Tórshavnar kommuna ikki svaraði einum fyrispurningi frá einum borgara um bygging av gørðum í grannalagi hansara. Ongin verulig viðgerð var av málinum í góðar sjey mánaðir frá tí, at klagað varð til kommununa, tann 15. februar 2023, og fram til tann 3. oktober 2023, og borgarin fekk ikki svar. Umboðsmaðurin helt tað ikki vera nøktandi og ei heldur í samsvari við góðan fyrisitingarsið, at borgarin ikki fekk svar innan rímiliga tíð, og at kommunan sá burtur frá tinglýstu ásetingunum um bygging av gørðum, samstundis sum tinglýsta byrðan stóð við. Umboðsmaðurin gav Tórshavnar kommunu eina átalu fyri ikki at hava handfarið málið nøktandi og mælti kommununi til at endurskoða málið og fyrihalda seg til tinglýstu ásetingarnar.*

## 2. Málslýsing

Tann 20. september 2023 sendi A umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> *"Tórshavnar kommuna svarar ikki fyrispurningum um, hvussu tað gongur við mínari kæru. Eg meini, tíðin er alt ov drúgv. Haldi tað er bara rein fólkaligheit at svara."*

Viðløgd klaguni vóru avrit av viðkomandi skjølum og samskifti í málinum.

Av skjølunum sást, at klagarin, tann 15. februar 2023, sendi Tórshavnar kommunu klagu um bygging av gørðum hjá grannum sínum, har millum annað stóð:

*"Vísandi til viðlagda skeytið og ásetingar tess, serliga § 3, stk. 2, part 4 samanhildið við átalurættinum á síðu 6, fari eg við hesum at spyrja kommununa, um grannar mínir á báðum síðum hava loyvi at byggja nýggjar garðar, sum klárt víkja frá ásetingunum í nevnda skeytið. Hvat eru ítøkiligar ásetingar í einum skeyti til, um tær ikki skulu fylgjast?*

*Sakin snýr seg um eina lon - ella 6 raðhús í E. Hesi raðhúsini hava øll sama skeyti. Sjálvur búgvi eg í F, meðan grannarnir, ið bygt hava nýggjan garð, búgva í D og B.*

*...*

*Fyrst varð túnið í B óneyðuga nógv lyft upp (kanska eini 40-50 cm)... og síðani varð ein høgur kompaktur garður gjørdur- hægri enn áðrenn.*

*...*

*Summarið 2022 byggja tey í D so ein nøkulunda líka (ljótan) og høgan garð sum tey í B...*
*...*

*Í roynd og veru kundu vit gott lagt vertin á tað og bara roynt at tolerera tað fyri frið skyld, men mær dámar sera illa nýggju garðarnar - eisini vegna alla lonina ...*

*...*

*Vit vilja fegin vita, hvat kommunan sum kæru- ella átalumyndugleiki heldur um hetta málið. Yvirrular ein heilt generel áseting um hædd (og útsjónd) av garðum í kommununi eina ítøkiliga áseting í einum skeyti fyri eitt ávíst øki? Eitt raðhúsbyggjarí hevur ofta serligar ásetingar í mun til einkul privathús, tað eigur at takast við í hesum føri. Sambært upprunaliga byggiharranum hjá ... varð hetta um bygging ella broyting av garðum júst tikið ítøkiliga við í skeytið, fyri at garðarnir skuldu harmonera og fylgja lendinum, so húsini og gøtan kundu taka seg væl út, og so sleppast kundi undan júst slíkum tvídráttum sum hesum í framtíðini.*

*..."*

Viðkomandi ásetingarnar í skeytinum eru soljóðandi:

*"...§ 3, stk. 2*
*Hesar ásetingar verða annars at tinglýsa servituttbindandi á ognina:*

*...*

*4.Ognin skal hava fulla hegnskyldu móti vegnum og móti felagsøki, og annars hálva hegnskyldu móti granna. Við uppsetan av hegni, skal dentur leggjast á, at hegnið gevur eina dámliga rammu um avvarðandi ogn, og má eisini ansast eftir, at hegnið*

*klæðir økinum, sæð út frá einari heildarmetan ... Áðrenn hegn ella onnur girðing verður sett upp, skal góðkenning fyriliggja frá byggimyndugleikanum, ið eisini ásetur hæddina av girðingini.*

...

*Átalurætt viðvíkjandi pkt. 1 til 5 hava Tórshavnar Kommuna og eigarafelagið, sæð burtur frá ..., og reglunum um hegnskyldu (pkt. 4), har eigari av grannaogn eisini hevur átalurætt.*

*...”*

Við skrivi, dagfest 2. mai 2023, sendi klagarin Tórshavnar kommunu áminning um svar.

Við skrivi, dagfest 17. mai 2023, sendi Tórshavnar kommuna svar til klagaran, har kunnað varð um, at kommunan var farin í gongd við at kanna fyrispurningin, og at hann frætti aftur.

Við skrivi, dagfest 4. juli 2023, 23. august 2023 og 12. september 2023, sendi klagarin Tórshavnar kommunu áminning um svar.

Tá klagarin onki hoyrdi frá Tórshavnar kommunu, sendi hann umboðsmanninum eina klagu.

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika og klagara

Við skrivi, dagfest 21. september 2023, varð klagan send Tórshavnar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð kommunan biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum.

Við skrivi, dagfest 4. oktober 2023, sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum frágreiðing, har millum annað stóð:

*“...*
*Av tí at málsviðgerðin hevur verið burturstaddur í longri tíð og A hevur sent teldupostarnar beinleiðis til málsviðgeran, hevur hann tíverri ikki fingið svar.*

*Men nú er gongd á málinum.*
*Av tí at garðurin er nakað hægri enn 1,5 m, so krevur hann byggiloyvi.*
*Kommunan hevur samskift við grannan, sum sigur, at hann vil søkja um byggiloyvi til garðin sum skjótast.*
*Í skeytinum er ásett, at kommunan hevur átalurætt og tí skal avgerð takast til, um kommunan vil gera sín átalurætt galdandi.*

*A hevur fingið at vita, at grannin fer at søkja um byggiloyvi til garðin og at hann fær svar aftur tá umsóknin er viðgjørd.*

*...”*

Viðlagt frágreiðingini var skjalayvirlit umframt skjølini í málinum.

Við skrivi, dagfest 6. oktober 2023, varð frágreiðing Tórshavnar kommunu send klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 6. oktober 2023, sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar til frágreiðing Tórshavnar kommunu, har klagarin greiddi frá, at Tórshavnar kommuna í svari sínum bert hevði nevnt eina grannan, hóast klagað varð um báðar grannarnar. Harumframt stóð millum annað:

*“...*

*Mín kæra er fyrst og fremst grundað á ásetingarnar í skeytinum, sum eg havi sent teimum avrit av. Hetta skeytið er galdandi fyri øll 6 raðhúsini í lon okkara. Eg havi frá byrjan spurt tey heilt ítøkiliga, hvat eitt skeyti er vert í hesum samanhanginum. Hetta siga tey - eins og nevndin í Eigarafelagnum G, púrt einki um.*

*Um hesar ásetingarnar í skeytinum einki eru verdar, so er væl heldur ikki neyðugt at ganga undir aðrar felags ásetingar í gøtuni (hjá Eigarafelagnum), eitt nú at øll húsini í ymsu lonunum skulu hava sama lit o.l.*

...

*Hetta seinasta svarið bendir rættuliga týðiliga á, at tey ikki hava hug at samskifta um hetta málið, og eg veit heldur ikki, hvat tey hava samskift við grannar mínar um.*

*...”*

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2023, bað umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu um at svara uppfylgjandi spurningum viðvíkjandi, hvør málsviðgerð hevði verið av málinum, um kommunan hevði eina mannagongd fyri viðgerð av teldupostum, tá ið starvsfólk eru burturstødd, og hvussu langt tíðarskeið málsviðgerðin hevði verið burturstaddur.

Við skrivi, dagfest 1. november 2023, sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar, har millum annað stóð:

*“...*

*Eg slapp á ein stuttan kunnandi fund við kommununa ... (málsviðgeran og deildarleiðaran, mín viðm.) í seinastu viku, sum eg hevði biðið um.*

*Her spurdi eg serliga um virðið av einum skeyti, ella um ásetingarnar í skeytinum, sum eg havi kært út frá.*

*Eg haldi, at tey svaraðu rímiliga væl fyri seg - tað eru altíð ting, sum vit vanligu borgarar ikki eru nóg væl inni í ella vita nóg væl um. Tað var so tað, men ikki óvæntað vóru tey sum so samd við mær, og hildu at eg hevði fullan rætt at kæra, men ... (deildarleiðarin, mín viðm.) helt ikki, at tað nyttaði nakað hjá kommununi at blanda seg í slík mál. Tað hevði kommunan ringar royndir av, og tað kundi ganga fleiri ár at koma á mál, og onkutíð kom man als ikki á mál. Tey høvdu verið á staðnum og tosa við grannar okkara, men bara fyri at máta hæddina á garðunum, annar var eitt lítið vet ov høgur í mun til teir generelt loyvdu 150 cm (frá gongubreytini av og upp). Tey ásannaðu, at Eigarafelagið og kommunan vóru átalupartar, men sóu helst, at tað var Eigarafelagið, ið gjørdi sín átalurætt galdandi, og at eg setti meg í samband við Eigarafelagið um hetta. Hetta sá eg bara onga meining í, so leingi sum báðir grannar mínir eru í nevndini hava ein viðspælari í formanninum, umframt at Eigarafelagið longu hevði víst eina kæru um tað sama frá sær frá fólkunum í nr. ...*

*Nakað annað er, at kommunan eigur at hava meiri spesifikkar orðingar um garðar framyvir, tá felagsbyggjarí er sum t.d. okkara raðhúsagøta. Orðingarnar í skeytunum eru ov leysar.*

*...”*

Av tí, at umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá Tórshavnar kommunu, sendi umboðsmaðurin við skrivi, dagfest 21. november 2023, 30. november 2023 og 8. desember 2023, Tórshavnar kommunu áminning um at svara uppfylgjandi spurningunum.

Við skrivi, dagfest 11. desember 2023, sendi Tórshavnar kommuna viðmerkingar, har millum annað stóð:

*“...*

*Fyrst vil eg biðja um umbering fyri at tit ikki hava fingið svar og hava verið noydd til at rykkja eftir svari. Vit hava havt sera nógva fráveru seinastu tíðina og tað hevur veri trupult at fáa avgreidd øll mál til tíðina. Nú sær eitt sindur betri út.*

*Víst verður til skriv tykkara, dagfest 26. oktober 2023, j.nr. LUM-16- 23/18827-11.*

*Í skrivinum verða tveir spurningar settir, tað er:*

1. *Hvør viðgerð hevur verið av málinum frá 15. februar 2023 til 3. oktober 2023, tá klagarin verður kunnaður um, at kommunan hevur verið í samskifti við grannan um garðin?*

*Svar: Hjálagt eru skjøl sum vísa tað samskifti sum hevur verið frá 3. oktober.*
*Sum tað framgongur av hjáløgdu skjølum, so hava vit havt ein fund við klagaran, har hann hevur greitt frá málinum og har vit hava greitt frá hvat kommunan kann gera.*
*Vit bíða framvegis eftir eini umsókn frá grannanum, tað fara vit at rykkja eftir.*

2. *Hevur Tórshavnar kommuna eina mannagongd fyri viðgerð av teldupostum, tá ið starvsfólk eru burturstødd og hvussu langt tíðarskeið hevur málsviðgerðin verið burturstaddur?*

*Svar: Tórshavnar kommuna hevur ikki nakra skrivliga mannagongd fyri viðgerð av teldupostum tá ið starvsfólk eru burturstødd. Men avtalað er við starvsfólkini, at tá tey eru burturstødd í longri tíð (fleiri dagar), so skulu tey innstillað Outlook soleiðis, at fólk sum senda teimum teldupost fáa sjálvvirkandi svar, við boðum um, at málsviðgerðin er burtur og nær viðkomandi er aftur til arbeiðis.*

*...”*

Harumframt greiddi Tórshavnar kommuna frá tíðarskeiðnum, har málsviðgerin hevði verið sjúkrameldaður.

Viðlagt viðmerkingunum var avrit av fundarnotati frá fundi við klagaran, tann 25. oktober 2023.

Við skrivi, dagfest 13. desember 2023, sendi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu uppfylgjandi spurningar um, hvør støðan nú var viðvíkjandi umsóknini um byggiloyvi frá grannanum í nr. B. Umboðsmaðurin spurdi eisini, um klagari hevði fingið nakra frágreiðing um fyrispurning sín um byggingina hjá grannanum í nr. D, og hvørji sjálvvirkandi boð vórðu send klagaranum.

Við skrivi, dagfest 14. desember 2023, sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum viðmerkingar, har greitt varð frá, at málsviðgerin hevði verið sjúkrameldaður frá miðjum juni nakrar ferðir yvir longri tíðarskeið, og at deildarleiðarin fyrst í november tók málið til sín til

víðari viðgerð. Upplýst varð, at kommunan ikki hevði móttikið umsókn um byggiloyvi frá grannanum í nr. B, og at áminning var send. Harumframt greiddi kommunan soleiðis frá:

> *"...*
>
> *Á fundinum við klagaran tann 25. oktober 2023, vóru garðarnir hjá nr. D og hjá nr. B viðgjørdir. Men á fundinum tosaði klagarin bert um grannan í nr. B og tí hava vit eftirfylgjandi ikki gjørt nakað við garðin í nr. D.*
>
> *Viðvíkjandi sjálvvirkandi telduposti, so síggja vit ikki um klagarin hevur fingið sjálvvirkandi svar uppá sín mail. 23. august 2023*
>
> *Eg havi tosað við okkara KT-deild og tey siga, at tað er trupult at finna út av hesum, tí tað er so langt síðani og tí at "out of office" er broytt fleiri ferðir síðani, tað krevur at vit endurskapa nakrar loggar og tað er ivasamt um tað ber til og harafturat vil tað taka langa tíð. Hinvegin siga tey, at ein sum sendi skriv inn fær bert sjálvvirkandi svar frá sama persóni eina ferð, tí soleiðis er hetta innstillað.*
>
> ...
>
> *Eg dugi tí ikki at siga um klagarin hevur fingið sjálvvirkandi svar frá ... (málsviðgerin, mín viðm.) uppá hansara mail 23. august 2023*
>
> *..."*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2023, spurdi umboðsmaðurin klagara, um hann fekk nøkur sjálvvirkandi boð frá málsviðgeranum, tá hann umvegis teldupost til málsviðgeran, tann 23. august 2023, rykti eftir svari.

Tann 15. desember 2023 svaraði klagarin, at hann ikki hevði móttikið nøkur sjálvirkandi boð frá málsviðgeranum.

Við skrivi, dagfest 19. desember 2023, til Tórshavnar kommunu vísti umboðsmaðurin á, at klagan til Tórshavnar kommunu snúði seg um báðar garðarnar í nr. B og nr. D. Umboðsmaðurin spurdi í hesum sambandi, hvat kommunan ætlaði at gera við fyrispurningin um garðin hjá grannanum í nr. D, og um klagari var kunnaður.

Við skrivi, dagfest 8. januar 2024, sendi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu áminning um at svara spurningunum við einari freist áljóðandi eina viku.

Við skrivi, dagfest 12. januar 2024, boðaði Tórshavnar kommuna umboðsmanninum frá, at kommunan hevði fingið umsókn um byggiloyvi frá nr. B, og at umsóknin varð send klagara til viðmerkingar, áðrenn endalig støða fór at verða tikin til málið.

Viðlagt viðmerkingunum var avrit av telduposti frá Tórshavnar kommunu til klagaran, har millum annað stóð:

> *"...*
>
> *Viðvíkjandi garðinum hjá tínum granna, B, so hevur kommunan tann 17. desember 2023 móttikið eina umsókn frá teimum um byggiloyvi til verandi garð.*
>
> *Vit hava verið á staðnum og mált hæddirnar á teimum gørðum sum eru har, og tað fáa vit til:*
>
> *...*
> *B 156 cm. (partur er 101 cm.)*
> *...*
> *D 139 cm.*
> *...*
> *Sambært BK17 kap. 1,2, stk. 1, 5. petti, so er kunngerðin ikki galdandi fyri garðar upp til 1,5 m í hædd og tá er heldur ikki neyðugt við byggiloyvi.*
> *Garðurin í nr. B er 1,56 m høgur og tí hevur eigarin fingið boð frá kommununi um at senda inn eina umsókn um byggiloyvi.*
>
> *Vísandi til, at har eru nógvir ymiskir garðar, at garðurin hjá nr. B ikki skilur seg nógv burturfrá hinum garðinum og at garðurin endar uml. 1,2 m frá tygara marki, hevur kommunan ætlanir um at útskriva byggiloyvi til garðin.*
>
> *Viðvíkjandi skeytinum, so er kommunan ikki sinnað at gera sín átalurætt galdandi, vísandi til, at bæði eigarafelagið og granni mótvegis granna hava átalurætt.*
>
> *..."*

Við skrivi, dagfest 17. januar 2024, sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum kunning um, at byggimálið var sent klagaranum til viðmerkingar, og at klagarin hevði soljóðandi viðmerkingar:

> *"...*
>
> *Eg kærdi út frá eini greiðari áseting í skeytinum fyri húsini E, sum í sambandi við garðar "ávaraði" ímóti júst slíkum sjálvtøkubyggjaríi sum hesum, tvs. at útsjóndin*

> *móti H skal vera so vøkur og felags sum til ber, at garðarnir skulu fylgja lendinum/húsunum, so estetikkurin var í lagi og sleppast kundi undan ósemjum sum hesari.*
>
> ...
>
> *At kommunan ikki heldur, at báðu nýggju garðarnir bróta alvorliga frá restini og oyðileggja heildarinntrykkið av gøtuni/gørðunum, er rættuliga óskiljandi reint estetiskt, men sum so heldur ikki serliga óvæntað – og heldur ikki at kommunan helst ikki vil innblandast í slík trætumál.*
>
> ...
>
> *Hetta hevur tikið ljós og útsýni frá okkum, eins og heildarinntrykkið av gøtuni nú er ordiliga keðiligt og klaustrofobiskt (kann kanska eisini ávirka húsaprísin seinni).*
>
> ...
>
> *Til seinast vil eg bara endurtaka tað, sum eg segði á fundinum í kommununi seinast um garðar í slíkum byggjaríum. Kommunan eigur at vera meira innyvir slík (stór) raðhúsbyggjarí, tá tað kemur til garðar, serstakliga tá hæddarmunur er í økinum, og gera greiðar ásetingar fyri garðarnar...”*

Viðlagt kunningini var avrit av byggiloyvinum til grannan í nr. B umframt avrit av skrivi Tórshavnar kommunu til klagaran við kunning um byggiloyvið til grannan í nr. B.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um vantandi svar til klagaran og viðgerðina hjá Tórshavnar kommunu av fyrispurningum klagarans um garðarnar hjá grannunum.

Málsgongdin vísir, at klagarin við teldupostum javnan yvir tíðarskeiðið 15. februar 2023 – 12. september 2023 hevur biðið Tórshavnar kommunu um svar til fyrispurning sín um, hvørt grannarnir hava loyvi at byggja garðar, ið eftir hansara tykki víkja frá tinglýstum ásetingum í skeytinum viðvíkjandi gørðum, ið eru galdandi fyri allar grannarnar.

Ásetingin krevur millum annað, at hegnið klæðir økinum út frá eini heildarmetan, eins og hegnið skal góðkennast av byggimyndugleikanum, sum eisini ásetir hæddina á girðingini.

Viðgerðartíð og vantandi svar

Sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur myndugleikin innan rímiliga tíð at viðgera mál og at svara borgara, sum vendir sær til myndugleikan. Hetta er eisini galdandi, tá ein borgari vendir sær til starvsfólk myndugleikans, sum eru burturstødd.

Í skjølunum sæst, at málsviðgerin, tann 17. mai 2023, kunnaði klagaran um, at kommunan var í holt við at kanna fyrispurningin. Tað sýnist tó ikki sum, at fyrispurningurin veruliga varð kannaður ella viðgjørdur fyrr enn tann 3. oktober 2023, tá Tórshavnar kommuna heitti á tann eina grannan um at søkja um byggiloyvi til garðin grundað á, at ein kæra var komin inn um, at garðurin er hægri enn 1,5 m. Hetta var eftir, at klagað varð til mín.

Sum grundgeving fyri vantandi viðgerð og svari hevur Tórshavnar kommuna víst á, at málsviðgerin var sjúkrameldaður stóran part av tíðarskeiðnum.
Eg haldi hetta ikki vera eina umberandi orsøk vísandi til, at ongin gongd heldur sýnist hava verið í málinum í eitt tíðarskeið á yvir 4 mánaðir frá tí, at klagað varð til Tórshavnar kommunu, og fram til, at málsviðgerin varð sjúkrameldaður.

Sambært upplýsingunum, var málsviðgerðin burturstaddur, tá klagarin, tann 23. august 2023, sendi eina áminning um svar. Ongi sjálvvirkandi boð vórðu send klagaranum, og hann fekk ikki onnur boð um, at málsviðgerðin var burturstaddur.

Kommunan hevur upplýst, at ongin skrivlig mannagongd er fyri viðgerð av teldupostum, tá starvsfólk eru burturstødd, men at avtalað er við starvsfólkini, at sjálvvirkandi boð skulu sendast borgarum, sum skriva til teirra, tá tey eru burturstødd í fleiri dagar.

Sambært góðum fyrisitingarsiði, er hetta ikki nøktandi, og haldi eg tað vera átaluvert at drála við viðgerðini og ikki at svara klagaranum innan rímiliga tíð.

Spurningurin um garðarnar

Sambært góðum fyrisitingarsiði, eigur myndugleikin at fyrihalda seg til øll viðkomandi klagupunktir í klaguni og at svara borgara, ið vendir sær til myndugleikan í hesum sambandi.

Klagarin hevur víst á, at klagað varð um tveir garðar, og hevur lagt dent á, at klagan ikki snúði seg um hæddina á gørðunum, men um at garðarnir út frá eini heildarmetan bróta frá restini og oyðileggja heildarinntrykkið.

Undir viðgerðini av hesum máli hevur Tórshavnar kommuna í skrivi til klagaran víst á, at sambært BK17, kap. 1,2, stk. 1, 5. pkt., er kunngerðin ikki galdandi fyri garðar upp til 1,5 m í hædd, og at tá er heldur ikki neyðugt við byggiloyvi.

Sambært upplýsingunum í málinum, var tann eini garðurin hægri enn 1,5 m og kravdi tí byggiloyvi eftir BK17, meðan hin garðurin var lægri enn 1,5 m og kravdi tí ikki byggiloyvi eftir BK17.

Sambært § 3, stk. 2, 4. pkt. í tinglýsta skeytinum, har ásetingin um garðar eru lýst sum byrða, er full hegnskylda móti vegnum og móti fríøki og hálv hegnskylda móti granna. Ásett er, at garðarnir skulu geva eina dámliga rammu og klæða økinum, sæð út frá eini heildarmetan. Harumframt skulu garðarnir, áðrenn teir verða settir upp, góðkennast av byggimyndugleikanum, ið eisini ásetir hæddina. Henda áseting er ikki treytað av, at byggiloyvi krevst eftir BK17.

Í skeytinum er ásett í § 3, stk. 2, at Tórshavnar kommuna saman við eigarafelagnum hevur átalurætt viðvíkjandi punkt 1 til 5 í skeytinum. Hesin átalurættur er tinglýstur.

Sambært upplýsingunum í málinum, er byggingin av tí garðinum, ið kravdi byggiloyvi eftir BK17, farin fram, áðrenn søkt varð um byggiloyvi, og áðrenn byggiloyvið varð givið.

Kommunan bað, tann 3. oktober 2023, hendan grannan um at søkja um byggiloyvi grundað á, at ein kæra var komin inn um, at garðurin var hægri enn 1,5 m.

Kommunan hevur at sýna til ikki framt nakra veruliga málsviðgerð av gørðunum í mun til ásetingina í § 3, stk. 2, 4. pkt. í skeytinum um, at byggimyndugleikin skal góðkenna garðarnar, og at dentur skal leggjast á, at hegnið gevur eina dámliga rammu og klæðir økinum út frá eini heildarmetan.

Kommunan hevur tó undir viðgerð míni av málinum kunnað klagaran um, at kommunan ikki metir, at garðurin, sum krevur byggiloyvi eftir BK17, skilur seg nógv burturfrá hinum garðinum, vísandi til, at har eru nógvir ymiskir garðar, og at kommunan ikki er sinnað at gera sín átalurætt sambært skeytinum galdandi vísandi til, at bæði eigarafelagið og granni mótvegis granna hava átalurætt.

Eg haldi, at tá kommunan sum byggimyndugleiki hevur tryggjað sær tinglýstan átalurætt viðvíkjandi slíkum ásetingum um garðar í einum øki, tá eiga borgarar at kunna líta á, at fyrisitið verður eftir ásetingunum.

Eg haldi tað tí als ikki vera nøktandi og ei heldur í samsvar við góðan fyrisitingarsið, at kommunan sær burtur frá tinglýstu ásetingunum um bygging av gørðum í økinum, samstundis sum tinglýsta byrðan stendur við.

**Samanumtikið**

Eg fari samanumtikið at geva Tórshavnar kommunu eina átalu fyri ikki at hava handfarið hetta málið á nøktandi hátt og at mæla kommununi til at endurskoða málið og fyrihalda seg til ásetingarnar í tinglýstu byrðuni um garðarnar.

Eg fari at minna Tórshavnar kommunu á at svara borgarum, ið venda sær til kommununa innan rímiliga tíð, og at mæla til at skipa mannagongdir, ið tryggja, at teldupostar ikki detta niðurímillum, ella liggja ósvaraðir í longri tíð.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður